# 2 landsliðsleikarar og 1 rockstjørna

**Fríggjadagin fingu 24 pedagogar handað prógv á Lærara-skúlanum. Millum hesar 24 pedagogarnar vóru tveir landsliðsleikarar og ein vælkend songrødd her á landi**

PEDAGOGAR
*Ingrid Bjarnastein*



*Teir 24 pedagogarnir vóru: Jákup Baldvinsson, Joan Danielsen, Haldóra Holm, Ingigerð Holm, Astrid Joensen, Beinta Joensen, Alvi Justinussen, Borgarhjørt Larsen, Birna Mikkelsen, Allan Mortensen, Allan Mørkøre, Elin Mørkøre, Svanna Nielsen, Eyðna Norðfoss, Jógvan Philbrow, Haidi Poulsen, Magnus Pauli Poulsen, Sunrid Poulsen, Jóhanna Rubeksen, Karl Martin Samuelsen, Kári Skýlindal, Siri O. Sólstein, Irena Tróndheim og Jóhanna Vest*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Allan Mørkøre, Alvi Justinussen og Karl Martin Samuelsen fingu fríggjadagin prógv fyri lokna pedagogútbúgving. Teir eru ávíkavist kendir sum landsliðsleikarar og sangari, men fríggjadagin vóru teir ikki í landsliðsbúna, men í føroyskum klæðum.

– Hetta er tað, sum vit hava glett okkum mest til – at fáa útbúgvingina, og harvið at sleppa at arbeiða við menniskjum, og ikki minst børnum, sigur Allan Mørkøre, nýútbúgvin pedagogur.

Hinir báðir nikka játtandi. – At sleppa at arbeiða við børnum og menniskjum sum heild er felags fyri okkum øll, sum nú hava fingið útbúgvingina, leggja teir afturat.

Men teir tríggir hava eisini aðra útbúgving. Karl Martin er útbúgvin bilmekanikari, Alvi er snikkari og Allan er útbúgvin krambarkallur.

– Pedagogyrkið er so nakað, sum er komið við árunum, siga teir. Teir halda allir, at hetta er nakað, sum er komið við árunum, men hóast tað hevur ligið í bakhøvdinum allatíðina.

– Tað var ikki meira enn náttúrligt fyri mítt viðkomandi at veða pedagog, sigur Allan Mørkøre.

Karl Martin veit at siga, at Allan var tann, sum av fyrstan tíð lokkaði hann at søkja inn til pedagog. Ella lokkaði er kanska skeivt at siga, men hann var tann, sum purraði uppundir, tí áðrenn arbeiddu Karl Martin og Allan á sama stovni.

Men nú útbúgvingin er komin, hvat so? Teir eru allir væl áleiðis út á arbeiðsmarknaðin. Alvi hevur fingið arbeiði á frítíðarskúlanum í Gøtu, Karl Martin skal arbeiða í nýggja býlingshúsinum í Klaksvík, meðan Allan hevur fingið arbeiði á Bóndaheygi 14, sum er eitt sambýli.

Sosialurin ynskir Allan, Alva og Karl Martin og hinum 21 pedagogunum hjartaliga tillukku við útbúgvingini.



*Karl Martin Samuelsen, sangari, Alvi Justinussen, landsliðsleikari og Allan Mørkøre, landsliðsleikari her avmyndaðir saman við rektaranum Paula Nielsen. Teir kunnu nú allir ganga undir felagsheitinum: pedagogar*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Enn er óvissa

**– Tá sagt verður, at talan er um týðandi nøgdir av kolvetni, so merkir hetta bert, at tað er so mikið áhugavert, at tað er vert at arbeiða víðari við. Harvið er ikki sagt, at tað neyðturviliga vil vera talan um rakstrarverdugar nøgdir sigur Ben Arabo, stjóri hjá Amerada Hess**

OLJUEITING
*Jan Müller*



Bæði føroyingar og oljuheimurin sum heild bíða í stórum spenningi eftir úrslitinum av fyrstu lovandi boringini hjá Amerada Hess-samtakinum á landgrunninum. Oljumálastýrið segði í tíðindaskrivi eftir, at fundið varð gjørt, at talan er um týðandi nøgdir av kolvetni. Við blaðið Fregnir fríggjadagin sigur Graham Stewart, nevndarformaður í Føroya Kolvetni, at tá orðingin »týðandi nøgdir« verður brúkt, so er talan um minst 200 mill. tunnur av olju. Hann leggur tó dent á, at vit vita so lítið enn, at vit mugu pent bíða til úrslitini verða tøk einaferð í summar. Hann vísir eisini á, at Agip og Føroya Kolvetni vita enn ikki, hvar tey fara at bora. – Vit mugu bíða eftir frágreiðingini frá Hess sigur Graham Stewart.

Vit hava spurt Ben Arabo, stjóra í Amerada Hess, um týðandi nøgdir av olju eru minst 200 mill. tunnur!

– Tað er so ikki tað vit leggja í orðingina týðandi nøgdir. Hasi orðini mugu tí standa fyri hansara egnu rokning. Eg vil ávara ímóti at vera alt ov bjartskygd. Tað er alt ov tíðliga at siga nakað um rakstrarverdugar nøgdir.

Ben Arabo vísir á, at tá sagt verður týðandi nøgdir, so er tað tí, at tað er so mikið áhugavert, at tað er vert at arbeiða víðari við. Harvið er ikki sagt, at tað neyðturviliga vil vera talan um kommerciellar nøgdir. Hann sigur víðari, at vit skulu minnast til, at tað eru onnur fund, sum eru gjørd fyri nógvum árum síðani og sum hava ligið í 30 ár., sum so sanniliga eisini vórðu týðandi fund, men tey vóru ikki kommerciell tá.

Ben Arabo heldur, at vit mugu eisini ansa eftir ikki at foreinkla tingini. Tí tað er ikki bara nøgdirnar tað velst um. Tað er ov tíðliga enn at siga fyri vissu, hvussu stórar nøgdirnar eru, og tí er tað eisini ov tíðliga enn at siga, um at tað er omanfyri ella niðanfyri eina ávísa nøgd.

– Nøgdin er bara eitt. Finna vit út av, at nøgdin er í lagi, so er tað so nógv annað, sum skal vera tilsteðar. T.d. reservoirkvalitetur oa. Tað er tí nógv arbeiði eftir at gera, áðrenn man kann siga, um tað er rakstrarvert ella ikki. Vit vita meira einaferð í summar, men tað er ikki vist, at vit kunnu siga nakað við vissu.

Í samrøðuni við Fregnir sigur Graham Stewart, at teir (Agip og Føroya Kolvetni, blaðm.) vita ikki, hvar teir fara at bora. Teir mugu bíða eftir frágreiðingini frá Hess.

– Nú veit eg ikki, hvat frágreiðing hann tosar um. Er tað hon til Oljumálastýrið, ja so verður leingi at bíða eftir henni. Tað verður so ikki fyrr enn um áleið eitt hálvt ár. Og eg veit heldur ikki, hvussu nógv í smálutir tann frágreiðingin fer.



# Væleydnað føstulávintshald

FØSTULÁVINT
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Leygardagin var árliga føstulávintstiltakið hjá Klaksvíkar Hornorkestur í KÍ høllini. Tiltakið var væleydnað og frá Hornorkestrinum frætta vit, at teir eru sera vælnøgdir. Hóast veðrið ikki var av tí besta, so høvdu um 600 fólk leitað sær niðan í KÍ høllina, har bæði tunnusláttur og køkutombola var.



*Hesi gjørdust kattakongar. Standandi frá vinstru: Karina 10, Bárður 11, Marin 14, John 12, Andreas 9 og Elsa 8*
*Sitandi: Áron 6, Arne 8, Gunnar 5 og Otto 3*

### Stórt køkutombola

Sigast má, at køkutombolaði henda dagin var sera stórt, har vóru 415 vinningar, sum lokalir keypmenn og heilsølan saman við mammum, konum, ommum og øðrum høvdu latið.

### Silvi vitjaði

Tá ið ein góður tími var farin, lógu tær tíggju tunnurnar, sum Norðoya Sparikassi hevði latið, á gólvinum, og tíggju sera glað børn vóru harvið kattakongar. Serliga var átta ára gamli Arne glaður, tí at hann var komin allan vegin av Glyvrum at sláa tunnu. Kattakongarnir fingu hvør sín luksuspakka av slikki frá Statoil, umframt at øll børnini eisini fingu ein pakka. Silvi kom á vitjan, beint áðrenn tann seinasta tunnan datt á gólvið, og eydnaðist tað honum at gerast kattakongur. Silvi kastaði lut ímillum atgongumerkini um fimm kassar av Jolly. Og sjálvandi rungaði Silva tónleikur úr hátalarunum. Alt tiltakið vardi í tilsamans tveir tímar, og fólk hugnaðu sær.



*Hóast teir mongu vinningarnir, so vardi køkutombolaði bert hálvan annan tíma*



*Silvi gjørdist eisini kattakongur*



*Tey vaksnu hugnaðu sær við einum kaffimunni*

# Ùtoyggjafelagið gevur blað út

**Seinast í februar kemur nýggja blaðið Glóðin út**

ÙTOYGGJAR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ì løtuni situr nevndin í Ùtoyggjafelagnum og leggur síðstu hond á eitt blað, ið eftir ætlan skal koma út seinast í februar mánaða.

Blaðið skal bera heitið Glóðin, og kemur at innihalda kunning um viðurskiftini á teim føroysku útoyggjunum, tíðindi, søgur av ymsum slag og eisini okkurt søguligt tilfar.

Ùtoyggjafelagið varð sett á stovn tann 13. desembur í 2001, og er endamálið at betra viðurskiftini á útoyggjunum, samstundis sum útoyggjarnar eisini skulu mennast soleiðis, at tær kunnu standa á jøvnum føti við onnur pláss í Føroyum.

– Vit vilja hava fokus sett á útoyggjarnar í Føroyum, og vónandi kann blaðið hjálpa okkum við hesum, sigur Olga Biskupstø, nevndarlimur í Ùtoyggjafelagnum.

Blaðið Glóðin verður fíggjað við stuðli frá fyritøkum, sum lýsa í blaðnum, og skal eftir ætlan koma út fýra ferðir um árið.

Fyrsta eintakið av blaðnum verður borið út til hvørt húsarhald á øllum útoyggjum í Føroyum, meðan tey komandi bløðini verða send til limirnar hjá felagnum.

Harafturat verða bløðini eisini at fáa til keyps í sølubúðum kring landið.

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 101.000, árg. jun. 1998
120.000,-

Fiat Tipo 5H
km. 108.500, árg. mai 1989
Sýnaður 11'01 26.000,-

Ford Escort 1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. jun. 1997
70.000,-

Ford Escort 1,8D GLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
Sýnaður 06'01 51.000,-

Hyundai Accent 1,3LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda E2200 Vøruvognur
km. 91.500, árg. mar. 1997
v/mvg Sýnaður 06'01 95.000,-

Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h
km. 145.000, árg. mai 1992
Sýnaður 12'01 52.000,-

Mitsubishi Pajero 3H
km. 208.500, árg. sep. 1986
Sýnaður 07'01 45.000,-

Nissan Primera 2,0 SGL 4h
km. 28.000, árg. Aug. 1997
115.000,-

Peugeot 306 d 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Seat Cordoba 1,9D STC. 5H
km. 35.500, árg. Aug. 1999
125.000,-

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

WV Polo 1,4 i Classic 5H
km. 16.000, árg. okt. 1999
123.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg.1994
80.000,-

Sosialurin - 311820

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ

Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo